# útoyggj

**» Eg kundi sjálvandi ynskt mær, at tað vóru fleiri yngri fólk í bygdini. Og skal eg vera heilt erlig, so er tað uppá ein máta einsligt her norðuri, men vit trívast kortini**




**ARBEIÐI**

*Tað er altíð okkurt at gera hjá virknari húsmóður á bygd. Aslaug ansar egnum seyði og hjá øðrum. - Hetta er eitt gott lív, sigur hon*

## 18 kvinnur í einum ringi

Á eini oyggj við so fáum íbúgvum, er ikki so nógv at fara til. Men kortini finst eitt og annað, sum kann savna fólk.

Í Kalsoynni finst ein sjómanskvinnuringur, har kvinnurnar koma saman at hugna sær og binda til jólagávurnar, sum verða sendar sjófólkinum.

Hesir fundir verða her hildnir eina ferð um mánaðin, uppá skift millum heimini.

- Seinasta mánakvøld vóru vit heimi hjá Doru (Joensen) á Húsum, og tá vóru vit 18 kvinnur samlaðar. Onkur eldri kona kundi ikki koma, orsakað av kavanum, sigur Aslaug sum sjálv er sjómanskona.

Tað er tær báðar, Dora og Bodil Olsen sum skiftast um at hýsa kvinnunum, meðan tær skiftast um at baka.

- Jú, hetta eru góðar og hugnaligar løtur.



**» Seinasta mánakvøld vóru vit heimi hjá Doru á Húsum, og tá vóru vit 18 kvinnur samlaðar**

## Heimabakað er best

Í bygdarskúlanum eru sjey næmingar, harav fimm teirra eru gentur. Av tí at hinar genturnar eru úr grannabygdini fyri norðan, er Bjørg rættiliga ofta har norðuri og spælir, ella tey kom higar at spæla - kanska eisini beinleiðis úr skúlanum.

Systkin hennara koma javnan norður um vikuskiftini, og tá dámar Aslaug væl at forkela tey eitt sindur. - So koma tey altíð aftur, sum hon sigur.

Um vikuskiftini plaga tey at gera okkurt saman. Seinasta vikuskifti gjørdu tey garnatálg, og til aðrar tíðir er bakstur á skránni.

- Eg fekk ein miksara frá soninum, og hann brúki eg altíð tá eg skal baka breyð. Eg veit ikki rættiliga, men síðani tá hava tey ikki viljað havt keypt breyð, men bert tey sum eg sjálv havi bakað, sigur Aslaug við einum brosi.